# ...ju undir basaltinum



*Bjarni Djurholm oljumálaráðharri og Poul Mohr, nevndarlimur í Atlants Kolvetni á oljutingi*



*Mong kend andlit vóru at síggja á oljutinginum herfyri*

heldur at vit í dag kunnu ikki útiloka, at stórar oljugoymslur finnast undir basaltinum og entá langt undir basaltinum.

**Møguleikarnir eru har**

– Við tí vitan tú hevur um basalt, hvussu stórir heldur tú møguleikarnir eru fyri at raka við olju í teimum báðum komandi boringunum inni á basaltinum?

– Tað er ringt at siga, men møguleikarnir eru har. Trupulleikin er so tann, og tað veit man av royndum, at fyrstu boringarnar í einum nýggjum og ókendum øki geva sjáldan fund alt fyri eitt, men tað nýtist so heldur ikki at merkja, at har er einki. Upplýsingarnar tú fær við eini boring kunnu lættliga bera boð um, at olja er nærhendis sigur Beksgaard, sum sjálvur er realtivt bjartskygdur, tá tað snýr seg um at gera oljufund á føroyskum øki. Tí flestu staðni har borað hevur verið hevur man funnið kolvetnisspor. Tvs. at kring Føroyar finnast keldugrótsløg, sum generera olju. Hetta er altavgerandi fyri at kunna finna olju og gas í einum nýggjum øki. Lars Beksgaard heldur tað eisini vera sera áhugavert, at olja er funnin beint hinmegin markið og sipar her til stóra Rosebankfundið.

Hann telist annars millum teirra, sum halda, at vit mugu gera okkum út við toli, tí hetta kann fara at taka longri tíð, enn man hevði roknað við. Men leggur tó dent á, at enn er einki, sum bendir á, at her bara er talan um negativ viðurskifti, hóast einki veruligt lønandi fund er gjørt enn.





*Lars Bæksgaard, formaður í Sindri her saman við formanninum í Oljutinginum, Regin Hammer*

**Vitan uppá longri sikt**

Hvat heldur Lars Beksgaard so um arbeiðið hjá Sindri. Hevur tað veruliga verið við til at stuðla oljufeløgunum í leitingini eftir olju? Til tað sigur hann, at hóast Sindri hevur 13 ár á baki, so hevur arbeiðið hjá Sindri sum so ikki verið beinleiðis við til at hjálpa stórvegis í sjálvari leitingini eftir olju her og nú. Tað er Sindri heldur ikki ætlað til. Tað er meira ætlað til at kunna fara inn og loysa nakrar trupulleikar eitt nú viðvíkjandi basaltinum uppá longri sikt. Tvs. at skilja hví undirgrundin sær soleiðis út og hvat hon goymir. Tað hevur sjálvandi eisini týdning fyri oljufeløgini og myndugleikarnar at fáa hesa vitan

Sindri byrjaði í 91 og Lars Bæksgaard hevur verið formaður síðani 1992. Royndirnar við Sindri eru, at tað er gott at standa saman og brúka orku uppá felags áhugamál. Hann heldur tað var eitt sera skilagott stig, sum varð tikið við stovnanini av Sindri.

– Lyklaorðið er samstarv og inovatión og at arbeiða uppá longri sikt. Tú setir ikki sum krav, at tú skal røkka úrslitinum eftir stuttari tíð men at tað heldur verður arbeitt miðvíst fram ímóti at loysa mál uppá longri sikt.

At 15 oljufeløg standa saman um Sindri er rættiliga sjáldsamt, tá hugsað verður um, at tað eru myndugleikarnir, sum hava tikið stigið til tað sigur Lars Bæksgaard, sum fegnast um, at so mong fólk høvdu leitað sær at hoyra um arbeiðið hjá Sindri.